# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Nýggir leiðarar í Kristnastovu



*Øssur og Susan Berghamar, fráfarandi leiðarar í Kristnastovu, og Dora og Niels Pauli Nónstein, sum nú hava tikið við sum leiðarar*

*Mynd: Maria V. Poulsen*

**Eftir summarfrítíðina eru tað hjúnini Dora og Niels Pauli Nónstein sum koma at mynda leiðsluna í Kristnastovu í Keypmannahavn**

Mikukvøldið 13. august var eitt sonevnt Kristnastovu-kvøld í Ebenezer í sambandi við at hjúnini Dora og Niels Pauli Nónstein framyvir koma at mynda leiðsluna í Kristnastovu í Keypmannahavn. Tey hava tikið við eftir hjúnini Susan og Øssur Berghamar, sum hava staðið fyri arbeiðnum millum føroyingar í Kristnastovu í Keypmannahavn síðan 1973.

Niels Pauli Nónstein er hvalbingur og Dora, f. Lómstein, er úr Havn. Tey byrjaðu alment sum leiðarar eftir summarfrítíðina.

Í august í ár eru eisini 35 ár liðin síðan Susan og Øssur Berghamar fóru úr Føroyum til at byrja eitt arbeiði millum føroyskar útisetar í Keypmannahavn.

Susan og Øssur vera tó framvegis knýtt at verkinum í Kristnastovu og halda fram við vitjanum á t.d. Ríkissjúkrahúsinum og Hotel Tórshavn.

Heimasíðan hjá Kristnastovu: www.kristnastova.dk

**mg**



**2.R HF-prógv**

***Aftara rað f.v.:*** Milana Koncar, Saltangará; Conny Rasmussen, Saltangará; Anleyg Højgaard, Søldarfjørður, Jóngerð Petersen, Kambsdalur; Christine Reinhardt, Klaksvík; Birgit Frederiksberg, Strendur; Oddbjørg Bjartalíð Zachariasen, Klaksvík; Beinta Atladóttir Jacobsen, Saltangará; Henny Jacobsen, Oyndarfjørður; Elin Hansen, Norðragøta, og Annvør Arnfríðardóttir Jacobsen, Skálafjørður

***Fremra rað f.v.:*** Rannvá Hammer, Eiði; Leon Lauritsen, Skipanes; Oddur Mohr, Kambsdalur; Regin Frederiksberg, Saltangará; Tummas Eivind Jørleifson Hansen, Glyvrar; Sigmundur Johansen, Strendur, og Fríða Joensen, Fuglafjørður.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Martin Hansen, Runavík**, búsitandi í Viborg í Danmard andaðist sunnudagin 24. august, 75 ára gamal.

**Andreas Olivur Pauli Djurhuus, Porkeri**, andaðist sunnumorgunin 24. august, 57 ára gamal. Farið verður úr sjúkrahúskapellinum á Tvøroyri mikukvøldið kl. 19. Jarðarferðin verður úr Porkeris kirkju hósdagin kl. 12.30. Sungið verður úr sálmabókini.

Urnan við **Birgit Hendriksdóttir Jacobsen** verður jarðsett úr Havnar kirkju hósdagin 28. august klokkan 15.

**Dagurin**

**28. august. Augustinus**, deyður ár 430. Føddur í Tagaste í Norðurafrika. Eftir mongum ymiskum vegum gjørdist hann kristin og endaði biskupur í Hippo í Norðurafriku. Hann doyði tá ið vandalakongurin Geiserik kringsetti staðin. Augustin var mætasti kirkjulærarin í fornkirkjuni og hevði tær komandi øldirnar mikla ávirkan á kristna heimspeki og guðfrøði. Navnið Augustus er latínskt og merkir hin hátt upphevjaði.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin